# Forsetavalið lítla ávirkan á føroyskan búskap

**– Forsetavalið í USA ávirkar marknaðirnar í eina stutta tíð, men í longdini verða tað aftur tey meira grundleggjandi búskaparligu viðurskiftini, sum koma at stýra marknaðinum, sigur Jan Otto S. Holm, íløgustjóri hjá Kaupthing í Føroyum. Heimsmarknaðurin tók væl ímóti tíðindunum í gjárum, at Bush helst var afturvaldur**



*– Tað er vanligt, at tað kemur ein reaktión eftir eitt forsetaval, men sjálvt valið ávirkar bara marknaðirnar í eina stutta tíð. Sum frálíður eru tað aftur tey meira grundleggjandi búskaparligu viðurskiftini, sum aftur fara at stýra gongdini, sigur Jan Otto S. Holm, sum er íløgustjóri hjá Kaupthing í Føroyum*

BÚSKAPUR
*Eyðun Klakstein*

Amerikanska forsetavalið í gjár var fylgt við stórum spenningi kring heimin. Eisini vinnulívsfólk hildu eitt vakið eygað við gongdini, og eftir at greiðar ábendingar í gjár vóru um, at George W. Bush fór at vinna valið, komu fyrstu reaktiónirnar á marknaðunum.

Renturnar á partabrøvum á marknaðunum í Europa, Asia og Danmark fóru upp, og tað sama fór væntandi at henda, tá ið amerikanska marknaðurin lat upp eftir evstamark her á blaðnum. Dollarnir tóktist styrktur, og oljuprísurin hækkaði eitt vet.

– Tað er vanligt, at tað kemur ein reaktión eftir eitt forsetaval, men sjálvt valið ávirkar bara marknaðirnar í eina stutta tíð. Sum frálíður eru tað aftur tey meira grundleggjandi búskaparligu viðurskiftini, sum aftur fara at stýra gongdini, sigur Jan Otto S. Holm, sum er íløgustjóri hjá Kaupthing í Føroyum.

– Tað er umráðandi fyri marknaðin at fáa ein avgerð á forsetavalinum, og óansæð hvør vinnur, so kemur tað ein reaktión. Men helst er vøksturin í rentuni størri, um Bush vinnur, tí hann førir ein sera liberalan politikk, sum kemur vinnulívinum væl við.

### Avmarkað ávirkan í Føroyum

Amerikanska forsetavalið hevur lítla beinleiðis ávirkan á føroyska búskapin, tí samvinnan millum Føroyar og USA er so lítil. Føroyingar útflyta mest til europeiska marknaðin, men tann marknaðurin verður vanliga ávirkaður av gongdini í USA, og harvið er eisini ein óbeinleiðis samanhangur millum føroyska og amerikanska búskapin.

Útflutningur hevur sera stóran týdning fyri europeiska búskapin, og tí ávirkar búskaparstøðan í USA eisini Europa.

– Tað hevur fyrr víst seg, at gongur tað illa búskaparliga í USA, so ávirkar tað europeiska marknaðin, tí útflutningur til USA hevur so stóran týdning, sigur Jan Otto S. Holm.

Ein ábending um, hvat europeiskt vinnulív helt um amerikanska forsetavalið kom undan valinum, tá ið fleiri týðandi leiðarar í donskum vinnulívi søgdu seg vóna, at Bush fór at vinna valið. Hetta vónaðu teir, tí Bush førir ein sera liberalan politikk, har vinnulívið hevur leysar teymar, og marknaðartreytirnar í stóran mun sleppa at ráða. Hetta dámar vinnulívinum væl.

### Oljuprísurin hækkar

Oljuprísurin á heimsmarknaðinum ávirkar skjótt búskapirnar kring heimin – eisini tann føroyska búskapin – og líkt er til, at oljuprísurin fer at hækka við Bush sum forseta næstu fýra árini.

Gongdini hevur seinastu tíðina annar verið, at oljuprísurin er lækkaður. Tá ið prísurin var hægstur tann 26. oktober, kostaði ein tunna av tí sonevndu Brentoljuni 52 dollarar. Nú er prísurin eini 12 prosent lægri – ella um 46 dollarar.

– Tað eru fleiri viðurskifti sum gera, at oljuprísurin er lækkaður. Eitt er at goymslurnar í USA eru stórar, Kina hevur sett rentuna upp, og harvið verður væntað at minni eftirspurningur verður eftir olju næstu tíðina, sigur Jan Otto S. Holm.

Men Bush forseti kann fáa oljuprísirnar at hækka aftur. Orsøkin til tað er, at hann vil fylla amerikansku goymslurnar enn meira, og harvið verður eftirspurningurin øktur. Harafturat kann kríggið ímóti yvirgangi ávirka prísirnar, og so kann tann heimligi politikkurin í USA eisini økja um eftirspurningin eftir olju.

At oljuprísurin hækkar fær skjóta ávirkan í Føroyum eisini, og til dømis kann ein avleiðing verða, at tað fer at kosta meira at ferðast millum Føroyar og útlondini, tí flogferðslan verður so nógv ávirka á prísinum á brennievni. Eisini fiskivinnan kann skjótt koma at líða undir høgum oljuprísum.

Men Kaupthing í Føroyum heldur, at sjálvt forsetavalið í USA ávirkar bara marknaðin í eina stutta tíð, og sum frálíður verða tað aftur meira vanlig og grundleggjandi búskaparlig viðurskifti, sum koma at stýra búskapinum.

# Misnøgdur við skúlabarnakoyring á Tvøroyri

**David Findleton, bilførari á Tvøroyri, er misnøgdur við framferðina hjá kommununi viðvíkjandi skúlabarnakoyringini. Hóast eitt ár er liðið, síðani koyringin var boðin út, og royndarárið og avmarkaðað sáttmálaskeiðið harvið er úti, so er ikki boðið út av nýggjum. Hetta, og onnur viðurskifti, órógva David, men Kristin Michelsen, borgarstjóri, sigur onki óvanligt vera í framferðarháttinum og Innlendismálaráðið metir eisini, at neyðugt er ikki at bjóða útaftur**




*David Findleton, bilførari, er misnøgdur við framferðarháttin viðvíkjandi skúlabarnakoyringini á Tvøroyri, men borgarstjórin vísir á, at onki óvanligt ella óregluligt er farið fram*
*(Mynd: D. Olsen)*

SKÚLABARNAKOYRING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fyri einum ári síðani lýsti Tvøroyrar kommuna skúlabarnakoyringina leysa, so áhugað kundu geva boð inn. Sáttmálaskeiðið var avmarkað til eitt ár og gekk út í juni í ár.

David Findleton, bilførari, gjørdist orsakað av ymsum viðurskiftum ein dag ov seinur at geva tilboð inn tá og kom tí ikki við í kappingina um at koyra skúlabørnini.

Hetta skilir hann væl, hóast fleiri, eisini kommunupolitikarar, heittu á hann um at geva sítt tilboð hóast alt, tí hóast freistin var farin, so var enn nakað, til fundur bleiv um málið.

Men hann fekk at vita, eins og aðrir bilførarar, at koyringin var eitt royndarár, sum lýsingin eisini bendi á, tí sáttmálaskeiðið var frá august 2003 til juni 2004. Sostatt væntaði David Findleton, at koyringin aftur bleiv boðin út, tá skeiðið rann út.

– Men onki er hent. Sagt verður, at tað er alla tíðina royndarár og ger hetta eisini, at bilførarar kunnu ikki keypa bil tl endamálið. Eg keypi tó ein hóskandi bil hóast hetta, ætlaður til aðra koyring eisini, sigur David, ið hevur hóskandi bil frammanundan.

### Tóku ikki lægsta tilboð

Innan skúlin byrjaði aftur, var David Findleton á fundi við borgarstjóran, Kristin Michelsen, og fekk har at vita, at koyringin bleiv ikki boðin útaftur, tí kommunan er nøgd við koyringina og tann, ið røkir starvið.

– Tann, ið fekk koyringina, hevði ikki lægsta tilboðið, sigur David, ið hevði lægsta tilboðið, sum tó sum sagt kom ein dag ov seint, tá bjóðað varð.

– Munurin á lægsta tilboð, og tilboðnum, sum tikið varð av, er eini 75.000 krónur, vísur David á og hann vísir á, at hann torir at standa fram og vísa á hesi viðurskifti, tí hann hevur onki at missa, tí farna árið hevur hann nærum onga koyring havt fyri kommununa, mótvegis mongum túri frammanundan.

– Við hesum kann viðkomandi, sum hevur koyringina, eisini hækka prísin, sum honum lystir, tí ongin kapping er, og vit eru fleiri bilførarar, ið eru áhugaðir at bjóða, so her er góður møguleiki at spara, sigur David Findleton.

### Innlit

David Findleton hevur biðið um alment innlit í málið, men tað fær hann ikki, sigur hann. Eisini hevur hann biðið Innlendismálaráðið kanna málið, men har verður sagt, at neyðugt er ikki hjá kommununi at bjóða útaftur av nýggjum og meiria kann ráðið ikki gera við málið.

– Hinvegin sigur ráðið, at biður persónur un innlit, so eigur hann at fáa tað, sigur David Findleton, sum hevur sett seg í samband við løgfrøðing, tí hann metir ikki alt rugga rætt í hesum málinum.

### Fær innlit, um hann biður um tað

Kristin Michelsen, borgarstjóri, sigur tað vera rætt, at David Findleton hevur biðið um innlit.

– Hann hevur fingið svar og tilsøgn um, at biður hann skrivliga um innlit, so fær hann tað, tí hetta er vanlig mannagongd, sigur Kristin Michelsen.

– David Findleton var ov seinur at geva tilboð, tá boðið var út, sigur Krisitin Michelsen.

*Men hví verður ikki boðið út aftur?*

– Tað er púra vanligt, at eftir eitt royndarár, so verður mett um, og er ein nøgdur við tann, ið røkir starvið, so verður hildið fram og viðkomandi fær starvið, vísir borgarstjórin á.

*Men kommunan tók ikki lægsta tilboðið?*

– Tað er nú altíð upp til kommununa at gera av, hvat tilboð mett verður best at taka av, sigur Krisitin Michelsen, ið minnir á, at eisini Innlendismálaráðið hevur víst á, at neyðugt er ikki at bjóða út aftur.

– Biður hann um innlit skrivliga, so fær hann tað, tí tað er vanliga mannagongdin, og annars er onki óvanligt ella óregluligt farið fram, so her er okkurt, ið hann hevur misskilt, sigur Kristin Michelsen, og sigur seg ivast í, um hetta ikki okkurt, sum onkur vil fram við, nú tað av álvara stundar til kommunuval.



# Ynskja eisini fólkaatkvøðu um Suðuroynna sum eina kommunu

**Nú fram er komið, at sumbingar sleppa væntandi at atkvøða um spurningin um Suðuroynna sum eina kommunu, ger uttanflokkalistin í Vági vart við, at listin hevur heitt á býráð og borgarstjóra um fólkaatkvøðu um sama spurning**

FÓLKAATKVØÐA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Bygdaráðið í Sumba ætlar, at sumbingar skulu siga sína hugsan um Suðuroynna sum ein kommuna á eini fólkaatkvøðu.

Uttanflokkalistin í Vági ger í hesum sambandi vart við, at tann 14. oktober sendi listin bræv til Býráið og borgarstjóra um, at ynskiligt hevði verið við slíkari fólkaatkvøðu í Vági. Spurningurin til vágbingar skuldi verið hin sami; Skal Suðuroyggin vera ein kommuna. Og svarast skal ja ella nei.

Uttanflokkalistin er í dag umboðaður við tveimum umboðum í Vágs Býráð, og eru metingarnar í flokkinum annars helst líka ójavnar, sum millum fólk flest til henda spurning, siga umboð floksins, men mett verður, at rættast er at fáa greiðu á, hvat vágbingar meta um henda spurning.




I offer a **FREE** book
YOUR HOME-BASED BUSINESS
And How to Make it Work
To anyone who calls # 00(+47) 51 43 75 78 before 23:00 o'clock tomorrow night, November 5th
A free book mailed to you for no cost, and invitation to join my upcoming conferance call
Author, Pete Billac
(written 56 books, where 46 are best sellers)






Made by you

Fríggjadagin 5.november kl. 13-18 og leygardagin 6. november kl. 10-17 vitjar ein serfrøðingur frá Montana Idé Møblar á Hálsi. Kom og fá góð ráð og vegleiðing um innrætting við Montana.






Levering innan jóla skal bíleggjast innan 6. november kl. 17

Montana er ein skipan, ein fræls skipan, sum tú frítt kanst dusa tær innanfyri.
Útgangsstøðið er einfalt, men rúmar óendaligar møguleikar.
Lat hugflogið reika við sniði, litum og virkni.
Dyrka frælsið og tak fólk á bóli við sansaligum skapanarhugi og opnum sinni fyri nýggjum møguleikum.
Og vís hvør tú ert gjøgnum títt rúm.
Tí bara tú merkir, nær tú stendur í tínum rúmi.

IDEmøblar
Uppi á Hálsi
Tel 35 46 80

Montana



HEYSTMÓTIN Í HANDILSKJARNANUM






Handilskjarnin P/F
N. Finsensgøta 8 · Boks 1350 · FO-110 Tórshavn
Tel 317919 · Fax 317930 · www.handilskjarnin.fo